## Scenografiskeið á Viðareiði

Í mars skipar MáF saman við Klaksvíkar Sjónleikarafelag fyri scenografiskeiði á Hotel Norð á Viðareiði. Skeiðið gevur innlit í tey amboð, modernaði scenografurin brúkar í dag, sigur MáF. Lærari verður Maria í Dali, scenografur á Kongliga Teatrinum í Keypmannahavn, sí www.scenograferne.dk. Hjálparlærari verður Anna Sofía Egilstrøð, scenografur í Sjónleikarhúsinum í Havn. Skeiðið verður fríggjakvøldið 7. mars kl. 19 og endar sunnudagin 9. mars kl. 16. Skeiðið er fyri øll, ið hava áhuga fyri scenografi og sjónleiki. Pláss er fyri 20 fólkum. Meira fæst at vita á heimasíðuni hjá MáF www.maf.fo.

## Nýggjur sjókaðal í Sandoynna

SEV hevur bílagt ein nýggjan sjókaðal til Sandoynna frá italsku kaðalverksmiðjuni, Prysmian. Kaðalin kostar góðar 19 milliónir krónur, og kostnaðurin tilsamans er mettur til 22 milliónir krónur, tá kaðalin er lagdur. Kaðalin verður liðugur 1. juli næsta ár, og ætlanin er at leggja hann um Skopunarfjørð beint eftir ólavsøku. Um alt gongst eftir vild, kann sjókaðalin takast í nýtslu longu í august næsta ár. Tá verður Sandoyggin aftur bundin í meginøkið. Brek var staðfest á gamla sjókaðlinum, sum gongur millum Kirkjubø og Skopun, í februar í ár, og oljurikna verkið í Skopun hevur síðani veitt oynni streym. Í summar royndi kaðalskipið Nautilus Maxi at umvæla kaðalin, men tað miseydnaðist. Tá Sandoyggin aftur fær streym frá meginøkinum, verður verkið í Skopun steðgað, men framhaldandi brúkt sum eykaverk.

# Eitt risastig fyri føroyska gransking

**At døma eftir reaktiónini í føroyska granskingarheiminum var tað ein fiskur av teimum heilt stóru, sum løgmaðurj og fólk hansara fingu í trolið í gjár, tá atlimaskapurin í FP7 kom eitt risafet nærri at gerast veruleiki**

GRANSKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*



*Á Granskingarráðnum fegnast tey um, at tað nú sær út til, at Føroyar fáa atlimaskap innan gransking í ES. Frá vinstru: Kristianna Winther Poulsen, John D. Olsen og Annika Sølvará, stjóri í Granskingarráðnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nógv hava verið sett spurnartekin við, at løgmaður mitt undir sluttspurtinum av viðgerðini av figgjarlógaruppskotinum stingur av til Brüssel at hitta ES-komisserin í granskingarmálum. Men at døma eftir reaktiónini í føroyska granskingarheiminum, var hetta ein røtt avgerð hjá løgmanni at taka.

Úrslitið, sum føroyska samráðingarnevndin við Jóannesi Eidesgaard á odda kom aftur við, kann ikki yvirmetast, heldur nýggi stjórin í Granskingarráðnum, Annika Sølvará.

- Hetta er eitt stórt frambrot fyri granskingina í Føroyum. Frá at hava verið undirveitarar í nógvum av teimum granskingarætlanunum, sum vit hava verið við í, kunnu vit nú koma at granska á líka føti við granskarar í øllum ES-londum og atlimalondunum, sigur Annika Sølvará.

Saman við Kristionnu Winther Poulsen og John D. Olsen, myndar Annika Sølvará arbeiðið í Granskingarráðnum. Tey bæði fyrr nevndu eru beinleiðis bindilið millum føroyska gransking og granskingarumhvørvið í ES.

- Samráðingarnar á embætisstigi vóru koyrdar heilt fastar, og tí var helst einasti møguleiki at taka tað upp politiskt, sigur Annika Sølvará.

Stjórin á Granskingarráðnum leggur dent á, at enn er langur vegur á mál. Tann hurðin, sum hevur verið afturlatin, stendur nú á glopp. Frammanfyri liggur eitt stórt arbeiði fyri at fáa hurðina upp á víðan vegg, vísir hon á.

Stórtsæðallar granskingarætlanir innan ES byggja á netverk millum granskarar úr minst trimum londum upp í eini 15 til 20 lond. Hesin møguleiki fyri at netverka hevur ikki verið líka góður fyri føroyskar granskarar. Tí hava summi flutt part av granskinigini at til til onnur lond. Til dømis gongur ein partur av arbeiðinum hjá Pál Weihe út frá Syddansk Universitet í Odense.

### Hugburður fer at broytast

Annika Sølvará, Kristianna Winther Poulsen og John D. Olsen, leggja dent á, at enn er langt á mál, men frambrotið í gjár fer ivaleyst at skapa ein jaligan hugburð innan føroyska gransking. Hin parturin er sjálvandi, at tað skulu fíggjarligir resursir til at seta ferð á føroyska gransking, tí fyri at koma upp í eitt granskingarnetverk og fáa atgongd til ES-fígging, skal granskingarlandið sjálvt koma við minst 25 prosentum av pengunum ella tilsvarndi, ið skulu brúkast granskingarætlanina.

Føroyar hava verið og eru við í fleiri granskingarverkætlanum í ES-høpi, men ikki á jøvnum føti við onnur.

- Vit hava fleiri granskarar, sum eru frammalaga á sínum øki. Til dømis Bogi Hansen á Fiskirannsóknarstovuni, ið granskar innan veðurlagsbroytingar og havstreymar. Er tað nakað sum upptekur heimin í løtuni, so er tað veðurlagsbroytingar. Vit hava Pál Weihe og hansara fólk, ið granska í hvussu umhvørisdálking ávirkar arvaeginleikarnar. Bitland og SeaWave-ætlanin er eitt annað dømi, sum mátti flyta ein part av virkseminum til Danmark fyri at fáa veruliga gongd á. Bæði hesar verkætlanirnar, ætlanirnar sum hava ligið og bíða og framtíðar granskingarætlanir fara at fáa sera stóra nyttu av hesi avtaluni, sigur Annika Sølvará.

- Nógvar granskingarverkætlanir eru sleptar ella ongantíð blivnar til nakað, tí vit ikki hava havt hendan møguleikan, siga tey trý starvsfólkini á granskingarráðnum, ið eisini síggja heilt nýggjar møguleikar fyri ta komandi granskingarparkina, ið ætlanir eru á seta á stovn.

Tey vísa á, at nýggju møguleikarnir innan gransking eisini fara at koma høvuðsvinnu okkara, fiskivinnuni, til góðar.

- Vit kunnu ikki rokna við, at onnur fara at granska í okkara vinnu, um vit ikki sjálvi taka stig til hetta. Fyri tað fyrrsta eru tað vit, sum hava størsta áhugan í at gera tað, og fyri tað næsta hevur tað sera stóran týdning fyri atkunnamenna fiskivinnuna, at hetta verður gjørt, siga tey á Granskingarráðnum.

Tey vísa eisini á, at tað er alneyðugt, at peningur verður settur á fíggjarlógina til at menna hetta økið. Nakað av tíð fer at ganga, áðrenn hetta kemur upp á pláss, men í 2009 má peningur setast av, um vit sum land skulu fáa nakað burtur úr hesum nýggja møguleika, sigur stjórin í Granskingarráðnum.

# Gransking koyrd føst í embætisveldi hjá ES

**Løgmaður fekk í gjár politiskt lyfti um føroyskan atlimaskap í granskingarskipanini hja ES, ið kallast FP7**

GRANSKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Tvær høvuðsorsøkir vóru til, at tað eydnaðist at bróta ígjøgnum tjúkku ES-múrarnar og fáa lyfti um atlimaskap innan gransking. Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, ið stóð á odda fyri føroysku sendinevndini, sum í gjár var í Brüssel og samráddist um atlimaskap á granskingarøkinum.

Sambært Jóannesi Eidesgaard eru tær báðar orsøkirnar, at ES-kommiserurin innan gransking, Tær báðar orsøkirnar eru, at ES-kommisserurin innan gransking, Janez Potocnik, kemur úr einum av teimum minstu ES-londunum, Slovenia, við á leið tvær mió. íbúgvum.

- Hansara sjónarmið er, at støddin á landinum skal ikki vera avgerðandi fyri, at eitt land sleppur inn í hitan á einum slíkum øki. Hann segði við meg, at um tú vart komin fyrradagin, so hevði tað ivaleyst ikki borið til at fáa ígjøgnum, tí embætisverkið í ES vendi tummilfingurin niðureftir, men at hann skar ígjøgnum yvirfyri teimum. Hetta er eitt stórt mál, sum fullkomiliga var steðgað upp á embætismannastigi, sum mælti frá føroyskum atlimaskapi, sigur Jóannes Eidesgaard sigur við Sosialin á veg úr Brüssel.

- Eg skilji væl støðu Føroya sum lítil tjóð, umframt at Føroyar liggja so avbyrgdar í Atlantshavinum, segði ES-kommisserurin við løgmann.

Hin høvuðsfaktorurin, ið spælir líka stóran leiklut, er, at vit veruliga hava nakað at koma við, heldur Jóannes Eidesgaard.

Arbeiðið við at granska í veðurlagsbroyting, havstreymum og arvaeginleikum vóru so mikið áhugaverdar fyri komisserin, at hetta samanlagt gjørdi muni, sigur Jóannes Eidesgaard við Sosialin.